# Klárt at flyta inn í fyrsta lyklakláru íbúðina í Suðuroy



**ÍBÚÐIR**

*Nú um vikuskiftið verður sleppur fyrsti eigarin at flyta inn í ta fyrstu av fimm lykláklárum íbúðum, sum verða bygdar á Tvøroyri*

**Arbeiðstakarar**

Teir arbeiðstakarar, ið hava verið uppi í byggingini fyri Sven Roest, eru:

*Arkitektur: Albert Isfeld*
*EL: Sp/f SIMO*
*Málari: Martin í Nesi*
*HVS: Demich P/F*
*Útgrevstur: Páll Nilsen, GM-Flutningur og Sigurd Gudmundsson*

**ÍBÚÐARBYGGING** Nú er klárt at flyta inn í fyrstu lyklakláru íbúðina í Suðuroy, men í næstum verða farið undir at byggja fleiri

Áki Bertholdsen

Sunnudagin verður klárt at flyta inn í fyrstu lyklakláru húsini, sum verða bygd í Suðuroy.

Tað er Sven Roest, sum fyrr í ár fór undir at byggja lyklaklárar íbúðir á Heiðatrøðini í Suðuroy.

Fyrsta byggistig umfatar fimm íbúðir og tann fyrsta av teimum er nú liðug og eigarin, Bjarki Berg úr Hvalba, flytir inn sunnudagin ella mánadagin.

Eftir ætlan verður onnur íbúðin í hesum fyrsta byggistigi eisini liðug heilt skjót og gongst sum ætlað, verða hinar tríggjar lidnar í summar.

Seinni verður farið undir annað byggistig, men enn er ikki greitt, hvusu nógvar íbúðir, tað fevnir um ella, hvussu tað verður skipað.

Eitt, sum verður umhugsað, er at lata eitt sambýli verða ein partur av øðrum byggistigi.

Íbúðirnar eru púra klárar at flyta inn í, tí alt er liðugt, bæði innan og uttan og alt fylgir við, bæði køkur, allar hvítvørur og enntá eisini postkassin.

Íbúðirnar eru 98 fermetrar til støddar og hava køk og stovu í einum, trý kømur, gangur og baðiverilsi, alt hampuliga stórt og rúmligt.

Annars er ein lítil hemsur, við teknik- og goymslurúmi.

Íbúðirnar kosta 1,290.000 krónur at keypa og Sven Roest sigur, at nógvir fyrispurningar hava verið.

Í sambandi við byggingina er stórur dentur lagdur á at tær skulu vera so orkusparandi, sum gjørligt. Av tí sama hava tær flagtak, hitapumpu og gólvhita.

Seinnapartin í morgin, leygardagin, frá klokkan 13-17, ber til at síggja íbúðirnar.

aki@sosialurin.fo

# Jólakonsertir fyri alla familjuna

**FAMILJUTILTAK** Hetta vikuskiftið heldur Føroya Symfoniorkestur tvær konsertir, sum eru fyri alla familjuna

Áki Bertholdsen

Aftur í ár skipar Føroya Symfoniorkestur fyri jólakonsertum.

Konsertin er fyri alla familjuna og skráin er fjølbroytt við jólaløgum, filmstónleiki og felagssangi.

Hesar konsertirnar eru blivin ein fastur táttur í virkseminum hjá symfoniorkestrinum og tær eru altíð fyrsta vikuskiftið í desember.

Í ár verða tvær konsertir og tær verða í morgin, leygardagin, í KÍ Høllini í Klaksvík og sunnudagin í Høllini á Hálsi.

Báðar konsertirnar verða klokkan 16.

Solistar á konsertini eru evnaríkir unglingar úr Musikkskúlanum.

Marta Johannesen, spælir kenda lagið hjá Gluck, Danced of the Blessed Spirits og

Billa Sandoy spælir vakra millumsatsin úr konsert eftir Baermann.



**FAMILJUVINARLIGT**

*Hetta vikuskiftið fer Føroya Symfoniorkestur at halda familjuvinarligar jólakonsertir í klaksvík og í Havn við jólaløgum, kendum filmstónleiki, barnakóri og øðrum tónleiki*

Somuleiðis fara Kristina á Váli og Anna á Váli Smith at framføra ein krevjandi sats úr dupultkonsert fyri tvær celloir eftir Vivaldi.

Seinast, men ikki minst, spæla tey trý, Rúni Hentze, Ernst Remmel, Laila Poulsen kendu trioina Bugler's Holliday.

Á skránni til konsertina er umfram hettar, ymiskt jólaligt og felagssangur.

Harafturat fer orkestrið at spæla tónleikin til filmarnar "Pirates of the Caribbean" og "Mission Impossible" og annan kendan filmstónleik

At enda fer stórt barnkór, við børnum úr Klaksvík, av Glyvrum, úr Vestmanna og úr Havn at syngja sangirnar "Um tú hittir jólamannin" og nýggja sangin hjá Steintóri Rasmussen, "Kavaparadís" umframt aðrar sangir.

Tað er Annfinnur Heinesen sum er frásøgumaður og Bernharður Wilkinson, sum stjórnar.

Atgongumerki eru at fáa á nlh.fo og í Kunningarstovuni.

aki@sosialurin.fo